# Fimleikafelagið Støkk

**Vit byrja fimleikin aftur mánadagin 1. oktober 2001**

Kostnaður fyri hvørja hálvu:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.–4. fl. | kr. 125,00 | Børn 5–6 ár | kr. 125,00 |
| 5.–8. fl. | kr. 150,00 | Vaksin (17 ár og eldri) | kr. 250,00 |
| 9.–10. fl. | kr. 200,00 | Eykalið | kr. 50,00 |

***Venjingartíðir í Støkkhøllini***

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|---|
| Kl. 16.00–17.00 Gentur, 1. fl. | | Kl. 16.30–18.00 Reiðskap Eldri G. Marjun/Ludvík | Kl. 16.00–17.00 Dreingir, 1.–2. fl. Ann Mari/Jónvá | Kl. 16.00–17.30 Dreingir, 3.–4 fl. Poul Espern | Kl. 13.00–17.00 Reiðskap Gentur & Dreingir Ludvík |
| Kl. 17.00–18.00 Gentur, 2. fl. Randi/Kristina | Kl. 17.30–19.00 Dreingir, 6.–7. fl. Heri | Kl. 18.00–19.30 Reiðskap úttøkulið G Anita/Durita/Anna | Kl. 18.00–19.30 Stórkapping Pinkur Lív/Linda | Kl. 18.00–19.30 Reiðskap Eldri G. Marjun/Ludvík | |
| Kl. 18.00–19.00 Gentur, 3. fl. Randi/Kristina | Kl. 19.00–20.30 Reiðskap Eldri G. Marjun/Ludvík | | Kl. 19.30–21.00 Dreingir, 9 fl. & eldri Heri | | Kl. 17.00–19.00 Reiðskap Dreingir Magni |
| Kl. 19.00–20.30 Gentur, 5. fl. Randi/Kristina | Kl. 20.30–22.00 Reiðskap Menn Ludvík | Kl. 21.00–22.30 Reiðskap Menn Ludvík | Kl. 21.00–22.00 Styrki/balansi Ingun | Kl. 20.30–22.00 Reiðskap Menn Ludvík | |
| Kl. 20.30–22.00 Kvinnur Eva | | | | | |

***Venjingartíðir í Glyvra skúla***

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|---|
| Kl. 17.30–19.00 Úttøkulið junior Rannvá | Kl. 18.00–19.00 Motiónskvinnur Sveiney | Kl. 17.30–19.00 Úttøkulið smágentur | Kl. 18.00–19.30 Børn 5–6 ár Stinu M/Marian/Helga | Kl. 18.00–19.30 Dreingir, 5.–6. fl. Poul Espern/Fróði | |
| | Kl. 19.00–20.30 Gentur, 6. fl. Lív/Linda | Kl. 19.00–20.30 Gentur, 7.–8. fl. Elsa/Miriam | Kl. 19.30–21.00 Gentur, 4. fl. Stinu M/Marian/Helga | | |
| | Kl. 20.30–22.00 Gentur, 17–20 ár Dagbjørt | | Kl. 21.00–22.30 Gentur, 9.–10. fl. Stinu M/Marian/Helga | | |


VIT ERU FLUTTIR
Í NÝGGJ HØLI!

**Nú húsast vit í Reynstúni 19 á Argjum**




**Fokus Elektronik**

Boks 2119,165 Argir
Tel 311306, Fax 311306


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1592, Sp/f Hólur, 950 Porkeri.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Zacharias Jóannes Fríbjørn Bech, 950 Porkeri (formaður) og Jónsvein Fríðálvur Bech, 655 Nes, Eysturoy.
Innkomin í nevndina: Jórun Petrea Bech, 950 Porkeri (formaður) og Mortan Pauli Bech, 950 Porkeri.

Skráseting Føroya tann 24. september 2001

Kristin Balle


P/f Restorffs ASSU


**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarsjúkrasystir til psykatriska Deild 1

Starvið sum deildarsjúkrasystir á Deild 1 á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. november 2001 ella eftir avtalu.

Deildin er ein opin psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Á deildini arbeiða bert sjúkrasystrar. Vit arbeiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við teimum nýggjastu terapihættunum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert, krevjandi og hevur nógvar avbjóðingar.

Deildarsjúkrasystirin hevur við tilvísing til yvirsjúkrasystrina á psykiatriska økinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, starvsfólkaleiðslu og menning av deildini.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- prógv frá DSH innan leiðslu, psykiatriska eftirútbúgving ella líknandi. Sjúkrasystrar, sum hava ætlanir um víðariútbúgving, kunnu eisini søkja
- hollar tekniskar royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- áhuga og royndir fyri fakligari starvsfólkamenning á deild
- góð samstarvsevni
- royndir og hug til leiðslu
- skal verða sjálvstøðugur, kreativur og hava visiónir
- skal hava ætlanir um frálæru og góðskumenning av starvsfólkunum

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 31 35 40, Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir, lokal 351 — e-post: bergitw@ahs.fo ella til Marin Samuelsen, deildarsjúkrasystir, lokal 421.

**Umsóknarfreistin er: 24. oktober 2001, kl. 12.00.**

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Veðrar og lomb

til sølu.

**Tlf. 254781**



# Húsavørður til Fíggjarmálastýrið

**Toll- og Skattstova Føroya**

Í Fíggjarmálastýrinum á Argjum húsast:

Sjálvt Fíggjarmálastýrið og stovnarnir: Hagstova Føroya, Føroya Gjaldstova, Lønardeildin og Toll- og Skattstova Føroya.

Her starvast um 90 fólk.

Søkt verður eftir húsavørði at byrja í starvi um miðjan oktober 2001.

**Uppgávurnar verða m.a.**
- umsjón av bygningi og innbúgvi hjá Fíggjarmálastýrinum
- umvælingar og viðlíkahald
- halda økið uttandura
- koyra við posti o.ø.
- aðrar umsjónarligar uppgávur

**Førleiki**
Tað er ein fyrimunur, um tú ert handverkari, men tó er hetta eingin treyt. Starvið krevur, at tú hevur koyrikort til persónbil, hevur góð samstarvsevni, ert álítandi og dugir væl at leggja arbeiðið til rættis.

**Setanartreytir**
Setanartreytir eru eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Birgit Hansen, deildarstjóra á Umsitingardeildini í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya, á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**5. oktober 2001**

Toll- og Skattstova Føroya
Postrúm 2151
FO-165 Argir

# Starv á Føroya Brandskúla

Søkt verður eftir stjóra til Føroya Brandskúla við Áir at byrja sum skjótast.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- at hava ábyrgd av rakstri og viðlíkahaldi
- at hava ástøðiliga ábyrgd av læruni
- at eftirútbúgving av starvsfólkinum er nøktandi
- at dygdarmenningin verður dagførd og gjøgnumførd
- at gera uppskot til rakstrarætlanir
- at øll peningaviðurskifti verða avgreidd á rættan hátt

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava hægstu maskinmeistara- ella nautiskuútbúgving.
Umframt verður kravt at umsøkjarin -
- hevur starvast sum skips- ella maskinstjóri í minst 3 ár
- dugur væl at samkifta skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum
- hevur sløkkileiðaraútbúgving
- hevur hollan kunnleika til Windows og MS Office

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett 22. oktober 2001. Løn og setanarviðurskifti eru millum Fíggjarmálastýrið og lærarar við maskin- og sjómansskúlarnar.
Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú seta teg í samband við Karl Joensen, stýrisformann • tlf 317811 • fax 314489 • e-mail: karl@arbeidseftirlit.fo

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skulu vera Stýrinum, Falkavegur 6, postboks 1134, FO-110 Tórshavn , í hendi í seinasta lagi 5. oktober 2001.

FØROYA BRANDSKÚLI

Føroya Brandskúli við Áir er ein sjálvsognarstovnur. Heimstaður stovnsins er Tórshavn.
Føroya Brandskúli byrjaði sítt virksemi síðst í 70-unum, og endamál stovnsins er at skipa fyri hollari verkligari og ástøðiligari útbúgving í:
- Fyribyrgjan av eldsbruna
- Nýtslu av eldsløkkingaramboðum,
- Eldsløkking o.a. í hesum sambandi.

Serligur dentur verður lagdur á útbúgving av næmingum innan sjómansútbúgvingar, soleiðis at hesir til eina hvørja tíð lúka tær við lóg, kunngerð v.m. ásettu reglur um eldsløkking v.m.
Stovnurin verður stýrdur av eini nevnd, ið hevur tríggjar limir. Maskinmeistaraskúlin og Føroya Sjómansskúli velja hvør sín lim, og triði limur verður valdur av Føroya Landstýri.


FÓLKADANSUR

# Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík

Í vetur verður dansað í bygdarhúsinum í Hósvík sunnukvøld kl. 19.00

Byrjað verður 30. september

Kostnaður fyri veturin kr. 400,00 pr. par



Lærarar eru Matilda og Tom Nielsen

Tilmelding á telefon 42 22 91 ella 42 24 25

Øll eru vælkomin!


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3220, Sp/f Sita, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 01.09.2001.
Nýtt hjánavn: Sp/f Mango (Sp/f Sita)

Skráseting Føroya tann 24. september 2001

Kristin Balle


**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650


# Goymslufólk/ Avgreiðslufólk

Søkt verður eftir goymslu/avgreiðslufólki til mjólkarvirkið í Hoyvík.

Viðkomandi skal vera álítandi og fyrikomandi, og eisini skal hann/hon hava koyrikort.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast ***áðrenn mánadagin 3. oktober 2001*** til:

**L/F MBM**
Búnaðardepilin
FO-410 Kollafjørður

Merkt: Umsókn

# Maskinsmiðir

Søkt verður eftir maskinsmiðum til ymiskt smiðjuarbeiði, at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir nærri avtalu.

Søkt verður eftir einum lærlingi til maskinsmið, at byrja skjótast gjørligt.

P/F TANGAVIRKIÐ

Tlf. 298 373065 · Fax +298 373934
FO-900 Vágur

# Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 28. sept. 2001.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
100 Tórshavn


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo